# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2018/19



## SPURDÓMUR: HVAR BÝR JÓLAMAÐURIN?



Granskarar: bólkur 3 í Sands skúla

Ata, Beinir, Demmus Rói, Andrea, Kjartan, Annika, Ró, Jón, Teitur, Karstin, Teodora, Elia, Marjun, Rúni og Súsanna

# INNGANGUR

At granska um jólamannin, og royna at finna út av, hvar hann býr, hevur verið eitt sindur ringt.

Vit hava funnið fram til, at tað ikki ber til at fáa eitt svar uppá allar spurningar.

Vit hava lært, hvussu man leitar eftir vitan.

Lærari: Lilian Clementsen og Kristian Højsted

lilian.clementsen@skulin.fo

Luttakarar:

Rúni og Súsanna úr 1.flokki

Karstin, Teodora, Elia og Marjun úr 2.flokki

Jón og Teitur úr 3.flokki

Annika, Beinir og Ró úr 4.flokki

Ata, Demmus Rói, Andrea og Kjartan úr 5.flokki

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

3. Legg eina ætlan

4. Savna upplýsingar

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sig øðrum frá

Fylgiskjøl

1. Grøvin
2. Coca Cola jólamaðurin
3. Gávur
4. Um jólamannin
5. Saint Nicolas
6. Búðstaður
7. Vit velja spurdóm

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Vit undrast á hvar jólamaðurin býr, og tað fara vit at kanna nærri.



# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Tað komu fleiri uppskot um, hvar jólamaðurin býr, men tað, sum øll skrivaðu var á Norðpólinum, Í Grønlandi og uppi í fjøllunum.



# 3. LEGG EINA ÆTLAN

Vit ætla at gera eina spurnarkanning og spyrja allan skúlan og barnagarðin, hvar tey halda, at jólamaðurin býr.

Nøkur ætla at leita á internetinum.

Og nøkur ætla at leita í enskt bókini "Mandy at home".



# 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

Vit fóru runt í skúlanum og spurdu øll børnini og allar lærararnar í skúlanum, hvar tey halda jólamaðurin býr.

Tey høvdu tríggjar møguleikar: á Norðpólinum, í Grønlandi ella uppi í fjøllunum.

So krossaðu vit av, tað, sum tey svaraðu. Og vit gjørdu eina stabbamynd av svarinum.

Vit gjørdu somu kanning í barnagarðinum.

Vit leitaðu á internetinum eftir upplýsningum um jólamannin.

Vit leitaðu í “Mandy at home” enskt bókini.



# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Fyrimyndin til jólamannin er Saint Nicolas.

Grøvin hjá jólamanninum er møguliga funnin undir einum turkiskum templi.

Fornfrøðingar halda seg hava funnið grøvina undir St.Nicolas-kirkjuni í suður Turkalandi.

T.v.s at jólamaðurin hvørki býr í Grønlandi ella á Norðpólinum ella í fjøllunum í Føroyum, men í Turkalandi.

***Men lesið nú*** : Klók fólk halda, at italskir sjómenn tóku líkið av St. Nicolas um ár 700, og fluttu tað til Italia til ein bý, sum nevnist Bari. (fylgiskjal 1)

So nú er spennandi at vita, hvør hevur rætt?

Í 1823 byrjaðu vit at hava hendan jólamannin, sum vit kenna. (fylgiskjal 2)

Í skúlanum halda tey flestu, at jólamaðurin býr á Norðpólinum.



Í barnagarðinum halda tey flestu, at jólamaðurin býr í fjøllunum.




Saint Nicolas var kendur fyri at geva gávur til fátøk. (fylgiskjal 3)

Vit hava funnið út av, at jólamaðurin hevur ikki nakran ávísan búðstað, tað kemur ann uppá, hvar man sjálvur býr. (fylgiskjal 6)

# 6. SIG ØÐRUM FRÁ

Vit gera eina stóra plakat, har vit vísa alt, sum vit eru komin fram til.

Foreldur og familjan koma í skúlan at hyggja.

(framløgur á foreldratiltaki)

# FYLGISKJØL

1.



# Saint Nicolas

## Grøvin hjá jólamanninum møguliga funnin undir einum turkiskum templi.

Fornfrøðingar halda seg hava funnið grøvina undir St.Nicolas-kirkjuni í suður turkalandi.

T.v.s. at jólamaðurin hvørki býr í Grønlandi ella á Norðpólinum ella í fjøllunum í Føroyum, men í Turklandi .

***Men lesið nú*** : Klók fólk halda at italiskir sjómenn tóku líkið av St.Nicolas, um ár 700 og fluttu tað til Italia ,til ein bý,sum nevnist Bari.

So nú er spennandi at vita hvør hevur rætt ?

2.



# Tá ið jólamaðurin bleiv til jólamannin

Jólamaðurin bleiv til jólamannin í 1823

3.

Í 13 hundra talinum bleyv hann kendur fyri at geva ørum folkum gávir





4.

# Jólamaðurin



Jólamaðurin var fittur. Og hann gav nógvar gávir. Hann var føddur í 280 og doyði 343 ☺

5.



# Saint nicolas

Hann livdi í 500 talinum og doyði 6 Des hann bleyv grivin í italia í eini kikju Basilica di San Nicola, esterno

6.



Teir mestu danskarar trúðu, at jólamaðurin búði í Grønlandi. men teir flestu Finnlensku trúðu, at hann kom úr einum báti úr Spania . í Amerika trúðu tey, at hann búði á Norðpólinum.

Føroyingar trúðu, at hann búði uppi í  fjøllunum, onkur helt at hann búði í einum hulduheyggi.

7.

Spurningar, sum øll børnini í skúlanum lótu inn í spurnarpostkassan, áðrenn arbeiðsdagarnir byrjaðu:

Vit valdu ein spurning og arbeiddu við honum í tveir skúladagar.


1 Hví hava vit jólatræ ?
2 Hví pyntar man jólatræ ?
3 Hví fáa vit jólagávur ?
4 Hví hongja vit hosu ?
5 Hví hava vit jólakalendara ?
6 Hví eitur tað jól ?
~~7 Hví var Maria vald at verða mamma at Jes~~
~~8 Nær og hví kom jólamaðurin ?~~
9 Hví er alt reytt á jólum ?
10 Hví kom stjørnan á himmalin ?
11 Er tað altíð kavi á jólum ?
12 Hví eta vit rísingreyt á jólum ?
13 Hvat er vanligasti jóladøgurðin ?
~~14 Hvar býr jólamaðurin ?~~